

Um tiltøkini:

## Heidi vann teknikappingina

Leygardagin 19. oktobur varð avdúka á Torginum í SMS, hvør hevði vunnið teknikappingina um 25 ára føðingardagsposan hjá SMS.

Fyrstu ferð hesin tátturin varð tikin upp í SMS var í 1979, men tá var kappast um at tekna bestu tekningina til jólaposan. Fyrsti vinnarin æt eisini Heidi, eins og hon í vann kappingina um føðingardagsposan. Tann Heidi var úr Klaksvík, og nevnast kann, at hon í dag er grafikari og starvast hjá Petur & Peturi, sum m.a. gera lýsingarbløðini, sum SMS ber út kring landið. Síðan helt kappingin fram líka fram til fyri heilt fáum árum síðan. Und-irtøkan tá var einastandi góð, og í einum av fyrstu SMS bløðunum stendur at lesa, at "í hundraða vís av tekningunum vóru innkomnar. Og soleiðis var tað hvørt ár kappingin fór fram.

Nú tátturin varð tikin upp aftur, kann sigast, at undirtøkan ikki var eins góð, men tó so, umleið 80 tekningar komu inn. Og eins og undanfarin ár, var ógvuliga torført hjá dómsnevndini at velja millum innkomnu tekningarnar. Men tá samanum kom varð dómsnevndin rímuliga samd um, at tekningin hjá 6 ára gomlu Heidi C. Hansen úr Vestmanna var tann besta. Og leygardagin 19. oktobur varð so alment avdúka, hvør vann teknikappingina, og hvussu 25 ára føðingardags-posin hjá SMS fer at síggja út. Umframt at tekningin hjá Heidi prýðir føðingardagsposan, vann Heidi eisini eina PlayStation 2 frá 3-arinum í SMS. Umframt Heidi, fingu nýggju aðrar tekningar smærri gávur frá handlunum í SMS.

## Finalistarnir í Nósabarnaprix vitja SMS

Týsdagin í komandi viku kemur nýggj føroysk fløga út á marknaðin. Tað er fløgan, har allir vinnararnir frá sangkappingini »Nósabarnaprix 2002« syngja á, umframt at nýggja Nósabarnaprix lagið eisini er á.

Tað eru teir báðir, Mark Joensen og James Olsen, sum standa aftan fyri tiltakið og fløguútgávuna.

Í sambandi við at nýggja og forkunnuga barna- og ungdómsfløgan kemur út, verður serligt tiltak á Torginum í SMS útgávudagin, týsdagin 12. november.

Nýggja fløgan verður seld, teir nýggju final-istarnir skriva autografar, og seint seinnapartin fara teir eisini at framføra løg úr fløguni.

Vertir í sambandi við tiltakið verða James Olsen og Angela.

Meir um tiltakið í fjølmiðlunum og á www.sms.fo í hesi og komandi viku.

# Atomic Kitten vunnu á Torginum



*Vinnararnir av "Wanna-be"-kappingini í SMS: Heidi, Hansa og Poula, sum upptraðkaðu sum Atomic Kitten*

Fríggjadagin 25. og leygardagin 26. oktober var innrás á Torginum í SMS av kendum tónleikabólkum og einstaklingum.

Bólkar sum Atomic Kitten, Creamy og Destiny´s Child og einstaklingar sum Shakira, Jóhanna Guðrún, Tony Braxton og Razz vóru á palli hesar dagarnar.

Vit tosa sjálvsagt ikki um veruligu stjørnurnar, men sokallaðar »Wanna-be´arar«, sum kappaðust um at líkjast kendu tónleikastjørnunum mest.

Íalt 18 einstaklingar og bólkar hvødu meldað seg til kappingina, sum var skipað í tveimum umførum.

Fríggjadagin eitt innleiðandi umfar, har allir luttakararnir sluppu at royna seg. Leygardagin var so finalumfarið, har 8 av teimum 18 luttakarunum frá fríggjadegnum vóru við í.

Finaluumfarið leygardagin gjørdist rættuliga spennandi, tí allir 8 luttakararnir vóru sannførandi í sínum framførslum.

Tá samanumkom vóru tær tríggjar 13 og 14 ára gomlu genturnar úr Saltangará, Heidi á Lakjuni, Hansa Hansen og Poula Lassen, sum vunnu »Wanna-be«-kappingina.

Tær framførdu lagið »The tight is High« hjá Atomic Kitten.

Tær vunnu eitt gávukort á 2.000 krónur og eina tasku frá Pepsi á tremur við Pepsi.

Nr. 2 gjørdist Rebekka R. Petersen úr Kollafirði, sum var Rachael Lampa, og nr. 3 gjørdust Annleyg Hansen, Ingibjørg Joensen og teirra dansifólk av Strondum, sum upptraðkaðu sum Creamy.

Vit ynskja teimum øllum tillukku.

Tað vóru SMS, Pepsi og Føroya Sparikassi sum í felag skipaðu fyri »Wanna-be«-kappingini í SMS, sum verður aftur komandi ár.

# Heystmótasýningin væleydnað

Hóskvøldið 24. oktober var árliga heystmotasýningin í SMS, har handlarnir í húsinum sýndu fram nýggjasta mótan.

Hesaferð legði tann 24 ára gamla Anna Kristin Bæk úr Kvíkvík sýningina til rættis.

Sýningarnar í SMS eru eitt av afturvendandi tiltøkunum í húsinum, og tær eru vanliga væl vitjaðar og væl fyri-reikaðar. Og tað sama kann sigast um sýningina hóskvøldið 24. oktober, sjálvt um onkrir av kørmunum kring tiltakið møguliga kundu verið eitt sindur betur fyrireikaðir. Men tað taka tey helst til eftirtektar til komandi sýning, sum verður í mars mánaði komandi ár.

Men sjálv mótasýningin var sera væleydnað. Umleið 400 fólk sóu snotuligu modellirnar sýna fram nýggjasta mótan innan klæðir, brillur og skógvar.




BRAKANDI BÍLIGT!

BARA Í ELDING • AVMARKAÐ NØGD

NÝTT!



• DVD
• CD
• VHS

SPAR 1705,00

5950,00

PANASONIC DVD SPÆLARI
NV-VHD1EC-S • DVD SPÆLARI,VIDEOMASKINA OG FLØGUSPÆLARI - ALT Í EINUM • Simultan upptøka/afspæling & recmonitor • Automatiskt output signalval • Seperate displays • DVD-patur: DVD-video, DVD-R, CD, CD-R/RW, MP3 playback • Optisk digital out & subwoofer terminal • One Touch memory • VCR-section: 12 tíma upptøka/avspæling & 35 x Jet Search i EP mode • CVC super Intelligent Timer • SQPB ( super-VHS Quasi Playback) • Vanl. prísur 7655,00

NÚ ERU DALI EUPHONIA HÁTALARARNIR KOMNIR TIL FØROYA - OG VIT SELJA FYRSTU HÁTALARARNAR VIÐ STÓRUM ÁVSLÁTTRI!



SPAR 7001,00

13999,00 fyri hvønn

NÝTT!

DALI EUPHONA HÁTALARI
ms4 • Frequency response : 33-28.000 Hz Cross-over frequencies : 2.900 Hz (15.000) Sensitivity (2.83V/1m) : 88.0 dB • Nominal impedance : 4.0 ohm • Minimum impedance : 3.6 ohm • Maximum SPL : 111 dB • Rec. Amplifier power (8 ohm) : 50 – 350 W High frequency drivers : 1 x 29 mm soft dome + 1 x 10 x 55 mm dipole planar tweeter • Low frequency drivers : 2 x 6.5” Bas reflex system resonance : 31.5 Hz • Mát (HxWxD) : 101.8 x 21.9 x 42.3 cm • Vekt : 35 Kg • Litur: Rouge Alpi • Vanl. prísur 21000,00 fyri hvønn



SPAR 1525,00

5450,00

JVC HI-FI SETT - PAKKATILBOÐ
RX-5020R Surround Receivari
XL-Z132 Fløguspælari
• Vanl. prísur 6975,00



SPAR 810,00

1290,00 fyri hvønn

DALI HÁTALARI
AXS5000 • Crossover Frequency : 3.3 kHz • Sensitivity (2.83V/1m.) : 90 dB • Nominal Impedance : 6 Ohm • Maximum SPL : 110 dB • Rec. Amplifier Power, 8 Ohm : 30 - 120 Watts High Frequency Driver :3/41⁄2 • Low Frequency Drivers :81⁄2 Enclosure Type : Reflex, 41 Hz Tuning • Mát (HxWxD) : 90 x 23.7 x 33.1 cm • Vekt : 13 kg • Litur Cherry • Vanl. prísur 2100,00 fyri hvønn





SPAR 3584,00

6950,00

JVC HI-FI SETT - PAKKATILBOÐ
RX-7022 Surround Receivari
XV-S302 DVD Spælari
• Vanl. prísur 10534,00

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

TILBOÐINI ERU GALDANDI TIL OG VIÐ 16. NOVEMBER 2002